


## KOMANDI TILTØK

Í mars mánaði fer sendimaðurin á vitjan á Eysturlandinum fyri at kortleggja og finna fram til samstarvsmøguleikar o.a. Byrjað verður við borgar-stjórarnar í Djúpavogi, í Reyðarfirði og í Seyðisfirði. Eisini vitjar sendimaðurin danska konsulin á Eystur-landinum (Jónas Hall-grímsson).

Eisini fer sendimaðurin at vitja fyritøkur, stovnar o.a. í Føroyum í mars mánaði.




## HVUSSU ÍSLAND RUDDAÐI UPP Í BANKAKERVINUM

BBC viðgjørdi her fyri, hvussu Ísland handfór bankaskrædlið í 2008. Í útvarpssendingini, The Inquiry, hevði verturin ymiskar gestir, ið greiddu væl frá, hvussu Ísland hevur handfarið skrædlið og hvussu tey gjørdu, fyri at koma víðari.

> *» Yvir nátt hvarv 80% av partabrævamarknaðinum og uppá nakrar fáar dagar var 97% av øllum bankakervinum horvið.«*

Íslendska stjórnin noktaði at bjarga bankunum, og er tað møguliga eindømi um tað. Í Íslandi var ein veruligur vilji til at læra av íkomnu støðuni, og tí stovnsetti stjórnin ein bólk til at finna sannleikan handan skrædlið. Teir, sum høvdu ábyrgdina av bankunum, skuldu nú eisini standa við sínari ábyrgd. Ákærin, Ólafur Hauksson, átók sær ábyrgdina av at kanna málini út frá løgfrøðini, og hevði tað við sær meira enn 60 rættarmál. Tað hevur verið eitt drúgt kanningararbeiði, og eitt av størstu málunum er yvir 22.000 síður. Hann leggur dent á, at tað er ógjørligt at endurskapa trúvirðið á bankakervinum, um hesi málini ikki verða kannað til botns - "it is always about trust", sigur hann.

Eftir bankaskrædlið, er arbeiðsmarknaðurin nógv broyttur í Íslandi. Áðrenn kreppuna komu áleið 500.000 vitjandi hvørt ár, men væntandi verður tað trífaldað í 2016. Ferðafólkavøksturin hevur eisini ført við sær eina nýggja vinnu, og ferðavinnan krevur ikki eins mong væl útbúgvin fólk, sum bankavinnan gjørdi. Hetta hevur ført við sær, at tað er neyðugt at innflyta arbeiðsmegi, serliga frá eysturevropa, men førir eisini við sær, at fleiri útbúgvin ung flyta av landinum, vegna vantandi arbeiðsmøguleikar.

BBC endar við einum bretskum gesti, ið tekur samanum og sammetir íslendsku bankavinnuna við tí bretsku og amerikansku. Tann útreinsanin, sum Ísland gjørdi í bankakervinum, var fyrimyndarlig, og hetta er ikki komið fyri í Evropa ella aðrastaðni enn, og heldur hann tí, at eitt tílíkt skrædl saktans kann henda aftur.

Hoyr sendingina her (Útvarpssendingin hoyrist her á enskum)
*Les meira* her (á enskum)

## ÍSLENDSKIR PENINGASTOVNAR STÓRT YVIRSKOT Í 2015



Teir tríggir høvuðsbankarnir – Arion banki, Íslandsbanki og Landsbankin – hava eitt samlað avlop uppá ISK 106,7 milliardir (~5,6 mia. DKK) í 2015. Avlopið hjá hesum trimum bankum er 31% hægri enn árið fyri.

Verður bert borið saman við fólkatalinum í Íslandi í mun til í Føroyum, so skuldu okkara høvuðsbankar havt eitt avlop uppá uml. 850 mió. DKK í 2015.

Býti av avlopinum millum teir tríggjar bankarnar er:

Arion banki – ISK 49,7 mia. ( ~2,6 mia. DKK)
Íslandsbanki – ISK 20,6 mia. ( ~1 mia. DKK)
Landsbankin – ISK 36,5 mia. ( ~2 mia. DKK)

## ÍSLENDSKI UTTANRÍKISRÁÐHARRIN Á VITJAN Í MIÐEYSTRI



Gunnar Bragi Sveinsson, uttanríkisráðharri, var í februar og vitjaði uttanríkisráðharrin í Jordan, Nasser Judeh. Á fundinum kjakaðust teir um sambond sínámillum og teirra felags áhuga fyri handli, turismu og orku. Eisini kjakaðust teir um støðuna í miðeystri, við einum grannalandi í kríggi og flóttafólkastreymin haðani frá. Jordan hevur tikið ímóti 1,3 mió. flóttafólkum og takkaði Gunnar Bragi fyri tað, hartil fortaldi hann eisini um, hvussu Ísland handfer flóttafólkamál.

Uttanríkisráðharrin var eisini og vitjaði Zaat, eina flóttafólkalegu nær við Syria. Flóttafólkalegan fær fíggjarligan stuðul frá Íslandi og arbeiðir hon serliga fyri rættindum hjá kvinnum og serliga kvinnum sum hava verið útsettar fyri harðskapi.

*Les meira her* (á íslendskum)

## FLESTU FERÐAFÓLKINI ÚR BRETLANDI OG AMERIKA




Nú hevur Íslendska ferðamálastofan útgivið endaligu tølini fyri vitjandi í fjør. Í alt vóru 1.289.140 ferðafólk í Íslandi í 2015, og tá eru tey 100.141, sum koma við teimum 108 cruise skipunum, ikki tald við. Flestu ferðafólkini, sum koma til Íslands, eru úr Amerika og Bretlandi. Heili 242.805 fólk vóru úr Amerika, meðan 241.024 vóru úr Bretlandi. Trið- og fjórðmest eru frá Týsklandi við 103.384 ferðafólkum og Fraklandi við 65.822 ferðafólkum.

Býtt í árstíðir, var mesti vøksturin um heystið, og heili 43.6% fleiri vitjandi komu til Íslands heystið 2015 í mun til 2014. Fyri hinar árstíðirnar eru eisini stórar hækkingar, vetrartíðin hækkaði 32.1%, várið hækkaði 29.1% og summartíðin hækkaði 24.2%. Í alt komu 291.584 fleiri ferðafólk samanlagt fyri allar árstíðirnar, og sum sagt 29.2% fleiri enn undanfarna ár.

Av øllum teimum sum koma til Íslands, koma næstan 20.000 til Seyðisfjørð við Norrønu. Har er býtið soleiðis, at 45% eru úr Týsklandi, meðan Danmark og Føroyar koma sum nummar 2 og 3 við ávikavist 10% og 9% hvør.

Trýstið á vinnuna er eisini nógv økt, og er ein ikki í góðari tíð at bíleggja sær bústað, útferðir ella líknandi, so kann tað gerast trupult at sleppa framat.

*Les meira her (íslendska hagstovan á enskum)*

### Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.tinganes.fo
Finn okkum á Facebook



## NÝGGJ FORSØGN FYRI FERÐAFÓLKATALIÐ Í 2016

Tveir mánaðar gamla forsøgnin hjá Isavia (Icelandic Civil Aviation Administration) fyri ferðafólk til og frá Keflavíkarflogvølli vísti, at talið á ferðafólkum til Íslands í 2016 fór at verða gott 1,5 mió. Nú sær hinvegin út til, at ferðafólkatalið verður gott 1,7 mió. Sambært frágreiðing frá Isavia, verður mesti vøksturin uttan fyri háárstíð, og verður hann væntandi frá septembur og árið út.

*Les meira her (á íslendskum)*

## FERÐAFÓLKATRYGD – ÍSLAND VERKSETUR LÝSINGARÁTAK UM, HVUSSU EIN UPPFØRIR SEG Í ÍSLENDSKU NÁTTÚRUNI




Ísland er vorðið eitt satt ferðafólkaland og ferðafólkatalið økist alsamt meira, men tað hevur eisini avleiðingar við sær. Serliga er tað náttúruna, sum ferðafólkini ikki virða á sama hátt, sum vanligt er. Í fjør summar snúði kjakið seg um tey vantandi almennu vesini, sum fingu ferðafólkini til at nýta náttúruna í staðin. Nú hevur kjakið vent sær til tað vantandi virðingina, ferðafólkini hava fyri náttúrumegini og vanligum íslendskum skikkum yvirhøvur. Eftir at nøkur óhapp hava verið í náttúruni, har onkur hevur mist lívið og onnur hava verið tætt við, er avgjørt at byrja eina nýggja lýsingarherferð.

Lýsingarherferðin skal ikki leggja dent á at fáa fleiri ferðafólk til Íslands, men heldur vegleiða, hvussu ein uppførir seg og trygt kann ferðast í náttúruni. Hartil skulu vandastøð eisini skeltast betur, alt hetta fyri at minka um óhappini, sum hava verið.

Í fjør fingu 245 fremmand ferðafólk skaða í Íslandi, sambært íslendsku løgregluni. Í fjør doyðu 7 ferðafólk og longu í 2016 eru tvey ferðafólk deyð.

*Les meira her* (á enskum)

## STUÐUL ÚR HORIZON 2020




Hóast Ísland ikki er limaland í ES, so gera íslendingar sær dælt av teimum stuðulsmøguleikum, ES bjóðar. Í seinasta mánaðarbrævi, lýstu vit stuðulin allan, sum hann var. Nú hevur Rannís útgivið nýggja grein um, hvussu gransking í Íslandi hevur verið stuðlað við 165 mió DKK síðan 2014. Horizon, ið stuðulsgrunnurin hjá ES eitur, stuðlar nýskapandi granskingarætlanum, sum skulu tryggja kappingarføri hjá Evropa í framtíðini og burðardyggan búskaparvøkstur. Í mun til íbúgvaratalið, hevði hetta svarað til, at Føroyar fingu áleið 25 mió. DKK fyri 2014 og 15.
Tey, sum hava fingið stuðul eru Háskúli Íslands, Háskúlin í Reykjavik, Háskúlin í Akureyri, Veðurstova Íslands, Landssjúkrahúsið, Icelandic Seafood International, HS-Orka, Georg, Íslendsk Nýorka og fleiri onnur.

Meira um hetta sæst her (á íslendskum)

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**